# Meistaraheitið aftur til Klaksvíkar

*Flogbóltur: Mjølnirkvinnurnar vunnu 2-0 á TB og eru nú so langt frammanfyri hini liðini, at einki teirra fær tær aftur. Tær eru tí Føroyameistarar enn einaferð*





Sveinur Tróndarson

Mjølnir-TB 2-0
(21-10, 21-10
21-19, 21-8)

Mjølnirkvinnurnar kunnu enn einaferð príða seg við heitinum Føroyameistarar í flogbólti.

Heitið hevur verið á veg í eina tíð, men leygardagin fall endaliga avgerðin og hetta hóast trý umfør enn eru eftir at leika av hesum kappingarárinum.

**Eingin mótstøða**

Fyri einari viku síðani hittust Mjølnir og TB í Trongisvági, og tann dystin vunnu klaksvíkskvinnur. Tí var lítið annað væntandi enn, at tær fóru at endurtaka sigurin leygardagin tá liðini hittust í Klaksvík, og so var.

Mjølnir vann dystin greitt 2-0 og sum settúrslitini siga, so var ikki tann stóri spenningurin í dystinum. Triðja settið var tað einasta, har TB gav líkinda mótstøðu, men tað var ikki nóg mikið til at fáa Mjølnir av kósini. Tær funnu stórspælið fram aftur í fjórða settið, sum tær vunnu heili 21-8.

Úr Klaksvík frætta vit, at tað ongantíð var nakar ivi um sigurin. Mjølnir leikararnir eru ov royndar í leikum til at lata møguleikan fyri enn einum meistaraheitið fara aftur við borðinum og tær vóru omaná allan dystin.

**Tær ungu fáa kjansin**

Vit hava fleiri ferðir áður nevnt, at ein av orsøkunum til, at Mjølnirkvinnurnar vinna og vinna er, at tey duga so sera væl at seta nýggjar leikarar við. Sjáldan, ella ongantíð, merkist, at leikarar gevast, tí tað standa altíð nýggir leikarar og bíða eftir møguleikanum. Leikarar, sum hava roynt seg á besta liðnum nakrar ferðir og sum tí ikki eru púra blankir, tá eitt nýtt kappingarár byrjar.

Nú meistaraheitið er í hús, eru eisini útlit til, at Mjølnir ætlar sær at gera nakað fyri teir ungu leikararnar, sum hava evnini til at leika í bestu deildini, tí sum Sosialurin skilir, so er ætlanin, at fleiri ungir leikarar skulu upp at venja saman við besta kvinnuliðnum.

Ætlanin er, at hesir leikarar í fyrsta umfari skulu venja saman við besta liðnum, men tað er heldur ikki óhugsandi, at onkur teirra sleppur at royna seg á besta liðnum áðrenn hetta kappingarárið er av.

Hetta er skilagott tiltak, og kann vera júst hornasteinurin undir einum nýggjum meistaraheitið frammi í tíðini. Slíkt gevur ungu leikarunum blóð á tonna og ger teir búnar til leikin, tá teirra herðar skulu bera hann.

**TB er við enn**

Hóast TB tapti dystin leygardagin, so eru tær kortini næstfremst í landskappingini hjá kvinnum. Tær liggja ájavnar í stigum við Drátt, sum kortini hevur leikt ein dyst fleiri enn tær.

Skulu vit gita um hvat av liðunum fer avstað við silvurmerkjunum, so fara vit at geva TB fyrimunin. Tær hava higartil í ár víst, at tær hava dygdir fram um Drátt og Fleyr, og tað skal fara at vísa seg, at tað verður nóg mikið til silvurið.

# Til Danmarkar at spæla flogbólt

*Flogbóltur: Mjølnirkvinnurnar, sum hava verið suverenar í ár, vera í apríl við í altjóða kapping í Ubberud á Fjóni*

Sveinur Tróndarson

Hjá klaksvíkskvinnum hevur hetta árið verið ein sonn sigursgongd. Tær hava vunnið allar dystirnar í landskappingini uttan ein og tað hava tær gjørt so ruddiliga eisini. Í onkrum dysti hava tær vallað fingið sveittan á pannuna áðrenn sigurin var heima, og tað er ikki serliga gott tekin, tá hugsað verður um støði føroyskur kvinnuflogbóltur er á í løtuni.

Antin eru Mjølnirkvinnurnar alt ov góðar til føroysku kappingina, ella eru hini liðini alt ov minni góð til at spæla móti stoltleikanum hjá Klaksvíkini.

Hesum ætla Mjølnirkvinnurnar sær nú at finna út av. Tær hava tí boðað frá luttøku í eini altjóða flogbóltskapping, sum verður í Ubberud á Fjóni í Danmark og tær ætla sær at verða við í besta bólkinum.

Kappingin tær skulu vera við í eitur Ubberud Cup og verður fyriskipað á hvørjum ári. Luttakandi liðini koma úr fleiri londum, og tí verður talan um eina sera spennandi kapping fyri teirra viðkomandi.

Ubberud er lítil býur, einar fimtan kilometrar uttanfyri Odense, og er partur av Odense kommunu. Felagið hevur lið, sum leika divisiónsflogbólt og umstøðurnar at leika flogbólt í Ubberud eru stak góðar. Har er ein góð ítróttarhøll til endamálið.

**Kend í Føroyum**

Um so er, at onkur føroyingur við tilknýti til flogbólt, heldur, at Ubberud ljóðar kent, so er tað ikki uttan orsøk. Felagið hevur motiónslið, sum hava lagt sær leiðina til Føroya meiri enn ta einu ferðina.

Ein av oddamonnunum í flogbóltinum í Ubberud er Henning Muldager, sum samstundis er kendur, sum Mr. Volleyball á Fjóni. Hann hevur sitið sum formaður í Fyns Volleyball Kreds í eitt mannaminni og er eisini kendur fyri at vera Føroyavinur burturav. Tí er einki at ivast í, at hann fer at fegnast um at Mjølnir kvinnurnar leggja sær leiðina fram við teirra kapping.

Hjá Mjølnirkvinnunum verður talan um eina stóra uppliving. Donsku kappingarnar eru sera væl fyriskipaðar og liðini, sum luttaka, eru sera væl fyri. Tí kunnu tær uttan iva vænta sær eina spennandi og stuttliga kapping.

# Gudrid og tær taptu

*Flogbóltur: Gudrid Nolsøe og hinar í Fortuna taptu móti nýkosnu steypavinnarunum úr Holte, sum tykist hava fingið fótin fyri seg*

Sveinur Tróndarson

Gudrid og tær í Fortunu fingu ikki tað bestu byrjanina upp á endaspælið í donsku flogbóltslandskappingini.

Tær høvdu vitjan av Holte, sum seinasta sunnudag gjørdi bart móti DHG í steypafinaluni. Tann dystin vunnu tær 2-0, og tað var eisini úrslitið av dystinum millum Fortuna og Holte.

Sum vit hava frætt, so helt Holte fram við skilagóða spælinum frá seinasta vikuskiftið, og tað var einki, sum Fortuna kundi gera fyri at steðga tí. Fyrri hálvleikur var ein avgreiðsluspurningur, meðan seinni var eitt sindur javnari, um enn Holte enn setti dagsskránna. Tað eydnaðist Fortunu at vinna eitt sett, men tað var ikki nóg mikið.

Holte koma afturíaftur í javnbrótaranum og vann dystin 2-0.

Dysturin hevði ikki tað stóra upp á seg, tí øll fýra liðini, sum spæla í endaumfarinum hjá kvinnum eru komin víðari, og tað einasta sum nú verður spælt er um, hvørjum liðini skulu spæla ímóti í semifinaluni. Sanniliga ein løgin kappingarskipan, men sum vit hava skilt tað er tað seinasta árið hon verður leikt soleiðis. Næsta ár verða fleiri lið í deildini og samstundis verður sjálv kappingin broytt.

Menninir hjá Fortunu høvdu frí hetta vikuskiftið. Teir skulu spæla tveir dystir næsta vikuskftið. Annan friggjadagin móti Skov-



# Fleyr nýggjur meistari

*Flogbóltur: Menninir hjá Fleyr gjørdu skjótt av móti SÍ í Sørvági. Meistaraheitið er nú heima og nú er kósin sett móti sterypafinaluni*

Sveinur Tróndarson

SÍ-Fleyr 0-2
(11-21, 12-21
13-21, 14-21)

Nýggjur meistari er kosin í mansflogbólti og, sum tað longu hevur verið kunnugt fyri teimum flestu, so gjørdist Fleyr meistari.

Sunndagin vunnu teir dystin móti SÍ í Sørvági og nú er einki at gera hjá hinum liðunum í deildini. Fleyr er so nógs stig frammanfyri, at teir kunnu ikki fáast aftur.

**Móttøkan sveik**

Sum settúrslitini siga, var ongantíð nakar ivi um, hvat av liðunum fór at vinna. Spælið hjá Fleyr koyrdi nógv betri enn tað gjørdi hjá SÍ, og sum vit hava skilt, var tað serliga móttøkan hjá S´+I, sum sveik.

Móttøkan er, sum kunnugt, grundarlagið undir einum vælskipaðum álopsspælið, og tá móttøkan ikki er nóg góð, fer restin av lagi.

Sørvingar høvdu fingið sær styrk til dystin móti Fleyr, tí Suni Hansen, sum í fjør spældi við ÍF, var við teimum, men tað var ikki nóg mikið til at gera nakað við Fleyr.

Tað, sum SÍ vann, vann Jón Nielsen, og tað er kanska júst tekini um veikleikan hjá SÍ. Jón er so øgiliga einsamallur at vinna bóltarnar hjá teimum. Takið kann gerast honum ov tungt, tá eingin hjálp er at fáa frá hinum leikarunum.

**Sum eftir ánni**

Hjá Fleyr gekk harafturímóti, sum eftir ánni. Spælið var vælskipað og álopsspælið gekk eisini sera væl, hóast Jan Hentze sunnudagin var farin á liberoplássið at spæla orsakað av snuddi í knøunum. Plássið er honum kortini ikki heilt fremmant, tí tá Oyggjaleikirnir vóru, spældi hann framúr væl á liberoplássinum.

Í hansara stað var Pauli Hansen settur at spæla kantáleypari, og tað eydnaðist stak væl.

Rumenski venjarin hjá Fleyr, Pascu Romiva, mundi ikki halda stóra vandan lúra, tí hann hevði sett seg sjálvan uttanfyri, meðan hinir stríddust inni á vøllinum.

**Nú er tað steypafinalan**

Hetta kappingarárið er avgjørt og í veruleikanum hevur Fleyr einki at spæla um, men soleiðis er teirra fatan kortini ikki. Tríggir dystir eru eftir at spæla í ár og teir skulu vinnast, siga havnamenninir.

Men kortini er eitt annað mál í ár. Eitt mál, sum ikki hevur verið har fyrr, og tað er steypafinalan. Hana ætla Fleyrleikararnir sær eisini at vinna, og tað er eisini skilligt. Hetta er fyrsta árið at møguleiki er at vinna greipuna, og tann møguleikan lata teir sær neyvan gleppa av hondum.

Mótstøðuliðið í steypafinaluni, sum verður leikt seinni í ár, og sum vit hava skilt, FBF arbeiðir við at fáa senda beinleiðis í SvF, verður Mjølnir, sum vann semifinaluna á Fram, fyri eini viku síðan. Hetta skuldi verið borgan fyri eini góðari og spennandi finalu, tí liðini eru góð, bæði tvey, og higartil í ár, er tað fyri so vítt bara Mjølnir, sum hevur givið Fleyr líkinda mótstøðu.



# Dráttur fekk hevnd

*Flogbóltur: Dráttur vann dystin móti ÍF á Giljanesi sunnudagin, og vann tvey týðandi stig í kappingini um silvurmerkini*

Sveinur Tróndarson

Dráttur-ÍF 2-0



Tað eydnaðist vágakvinnum at vinna dystin móti ÍF á Giljanesi sunnudagin. Tær vunnu hann greitt 2-0. Við sigrinum móti ÌF fingu tær hevnd fyri tapið móti fuglfjarðakvinnum seinasta vikuskiftið og samstundis vunnu tær sær tvey stig i kappingini um silvurmerkini. Tann kappingin stendur millum TB og Drátt.

**Feilirnir kostaðu**

Sum vit hava skilt tað, var tað ikki tann stóri munurin á spælinum, sum liðini bæði vístu sunnudagin. Dráttur hevur fyrr í ár víst, at tær eru sterkari í álopinum enn ÍF, og tað var ein av orsøkunum til, at tær vunnu sunnudagin.

Harafturat gjørdu ÍF kvinnurnar ov nógvar tekniskar feilir, og tað kostar tá tað er so javnur dystur.

Ein annar fakorur, sum eftir øllum at døma spældi inn hjá ÍF var, at motivatiónin eftir øllum at døma lá eftir í Fuglafirði.

Spælararnir høvdu ov lítlan hug at vísa, hvat teir duga, og manglar motivatiónin, er lítil vón fyri at vinna ein dyst. Hvørki í flogbólti ella nøkrum øðrum.

**Nærri enn fyrr**

Hjá Drátti kom sigurin væl við. Tær liggja og togast við TB um annaðpláss og høvdu tí brúk fyri hesum sigrinum. Í veruleikanum høvdu tær eisini brúk fyri sigrinum seinasta vikuskiftið, men tað, sum er farið, er farið.

Við hesum sigrinum er Dráttur nærri enn nakrantíð at silvrinum, men tað er kortini ein spurningur, um tær hava styrkina at taka silvurið frá TB. Í dystunum teirra millum er tað TB, sum hevur yvirvág, tí tær hava vunnið allar dystirnar móti Drátti í ár.

Men tá møguleikin er til staðar, hava eisini Dráttur leikararnir krav upp á ein kjans og hann skulu tær fáa. Trý umfør eru eftir, og livst so spyrst.

# Nú er Mjølnir omaná

*Flogbóltur: Menninir hjá Mjølnir gjørdu kvinnunum kynstrið eftir og vunnu 2-0. Fram legði rygg til tapið og tað kostaði annaðplássi*

Sveinur Tróndarson

Mjølnir-Fram 2-0

Nú sær út til, at tað fer at vera Mjølnir, sum fer at draga tað longra stráið í stríðnum um silvurmerkini í landskappingini hjá monnum. Annað vikuskiftið á rað vunnu teir 2-0 á Fram, og tann sigurin hevur við sær, at Mjølnir av álvara hevur sett trumf á í stríðnum um silvurið.

**Omaná alla tíðina**

Hóast Mjølnir og Fram hava vunnið og tapt hvørt um annað móti hvørjum øðrum í ár, so hevur tað í seinastuni eydnast Mjølnir at leggja trýst á Fram. Ungu havnarmenninir hava ikki havt eydnuna við sær mót Mjølnir, og samstundis hevur Mjølnir funnið stórspælið fram í kravdu løtunum.

Seinasta vikuskiftið spældu liðini bæði semifinalu í Runavík — í steypakappingini — og tann dystin vann Mjølnir 2-0. Tí var tað ikki óvæntað, at teir vunnu aftur í dag, men tað var ikki væntandi, at tað skuldi gerast so greitt.

Orsøkin til greiða Mjølnirsigurin var, at spælið hjá teimum riggaði betur enn tað gjørdi hjá Fram, og serliga eydnast tað Mjølnir at fáa breidd í spælið. Fyrr í ár fór næstan alt um hendurnar á Borko Ilic, men nú er tað eydnast honum, at fáa Boga at taka Trygva og Jóannes meira við í spæli aftur.

Hetta avlastar ikki bara Borko Ilic, men ger tað eisini torførari hjá mótstøðuliðnum at verja fyri.

**Fram viknar**

Um tað er tí, at kappingarárið er farið at halla, ella um tað er onnur orsøk fyri tí, vita vit ikki, men tað tykist, sum er Fram farið at vikna, nú landskappingin er farin at halla.

Fyrr í ár vóru tað teir, sum hingu í hølunum á Fleyr, men nú er tað Mjølnir, sum hevur sníkt seg til tann leiklutin.

Leygardagin var Fram eitt sindur skert, tí spælskiparin var ikki við í Klaksvík og tað merkist, serliga tá hann er ein av teimum mest royndu á liðnum.

Hinvegin fekk so ein nýggjur høvið at royna seg og tað kann koma til gagns seinni. Fram hevur kortini møguleikan at fáa silvurmerkini enn, men tað er ikki sannlíkt, nú teir taptu móti Mjølnir.